# Størri og léttari Mercedes-Benz M




*Hóast nýggi Mercedes-Benz M líkist forgangaranum er designið nýtt og smart*

**Mercedes Benz M kemur nú í aðru generatión, ið er vorðin størri, betri útgjørdur og léttari enn forgangarin. Bilurin fær nú eina heilt nýggja 4x4 skipan, sum deilir motormegina 50/50 prosent undir vanligari koyring**



*Mercedes-Benz M aftan. Bilurin er nú størri og betri útgjørdur enn forgangarin*



*Kabinan er rúmlig og gjørd í góðum gjøgnumførdum kvaliteti. Mercedes-Benz M hava 7-trins automatgir sum standard*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tá fyrsti Mercedes-Benz M kom á marknaðin í 1997, hevði hann ikki nógvar kappingarneytar. Men hesi árini síðan er marknaðurin fyri SUV bilar nærmast eksploderaður.

Bilar sum t.d BMW X5, Volvo XC90 og Porsche Cayenne eru nakrir av størstu kappingarneytunum hjá M-klassanum hjá Mercedes-Benz.

Hóast nýggi Mercedes-Benz M er vorðin størri og betri útgjørdur, er sjálvur bilurin vorðin væl léttari, við tað at hann nú hevur sjálvberandi karossarí í mun til forgangaran, sum hevði chassisrammu.

M-klassin verður drivin av øllum fýra hjólunum og fær nú eina heilt nýggja 4x4 skipan sum deilir motormegina 50/50 prosent undir vanligari koyring. Bilurin skaffast eisini við einum off-road pakka við luftfjaðraskipan, har fríhæddin kann broytast 15 cm og 100 prosent sperru millum for- og bakhjólini og reduktiónsgir.

Allir Mercedes-Benz M hava 7-trins automatgir, við girskifti á rattstammuni, sum standard.

Í fyrstu atløgu fæst bilurin við fýra ymiskum motorum og útgávum. Dieselútgávurnar: 280 CDI við 190 hk/440 Nm, og 320 CDI við 224 hk/510 Nm, og bensinútgávurnar: ML350 við 272 hk/350 Nm, og ML500 við 306 hk/400 Nm.

Nógv er gjørt burtur úr kvalitetinum, eisini í kabinuni sum nú er størri og rúmligari enn á forgangaranum.

## Fiat Croma



Á altjóða bilaframsýningini í Genéve fyrst í mars verður ein heilt nýggjur Fiat Croma sýndur fram, ið kemur við tveimum bensin og trimum dieselmotorum. Fiat seldi annars 450.000 Croma árini 1985-94. Tann bilurin bleiv gjørdur saman við Lancia Thema, Alfa 164, og Saab 9000

*Kelda: Motor Magasinet*

## Hyundai 65 prosent vøkstur



Í Danmark vaks sølan av Hyundai við 65 prosentum í 2004 í mun til 2003.

Hetta er meira enn dupult so nógv, sum danski bilmarknaðurin vaks í 2004

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

## Chevrolet Kalos Sprint



Bert fáar vikur eftir at tíðindaskriv varð sent út um, at Chevrolet Kalos nú kemur við trimum hurðum, verður nú upplýst, at Kalos eisini kemur í ein Sprint-útgávu við 1,4 litur motori, 131 hk og eini toppferð upp á 195 km/t

*Kelda: Motor Magasinet*

## Krasja á teldu



Um fá ár verður ikki neyðugt at krasjtesta bilar fyri at vita hvat teir halda til, og hvussu tryggir teir eru. Hetta er longu hent innan flogfør har t.d. nýggjast Boeing 777 er 100 prosent designað og testað við teldum

*Kelda: Motor Magasinet*

BILUR TIL SØLU



Rover 75 Club · árg. 2000 · km. 65.000
V6 · 150 hk · vetrardekk á 15" felgum
Summardekk á 17" felgum

TEL 22 63 50